planet.fo
Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Skulu vit tosa um sex?

Birita L. Jóansdóttir
Sexolog og Parráðgevi





SEX. Tað provokerar og eggjar. Tað fær okkum at rodna og krimpa saman. Tað kann vera deiligt og samstundis so ræðuligt. Tað bindir saman og skilir sundur. Tað skapar lív og elvir til deyða. Tað selur menniskju og menniskju selja tað. Tað skapar børn og børn verða oyðiløgd av tí. Tað gevur frælsið og førir til kúgan. Tað er vísindi og elvir til vitloysi. Tað er givið av Gudi og tað er tikið av Gudi. Og tað er eitt tað vakrasta vit eiga og kortini so ljótt.

Hvat er tað við hesum orðið, ið fær okkum at blíva so undarliga reyð í høvdinum og vísa eina so undarliga forkroysta atferð? Hví hava vit so ringt við at tosa um sex og seksualitet á ein sakligan og menniskjaligan hátt, uttan at gera tað í spe-isemi og við láturgerðan av okkum sjálvum og hvørjum øðrum? Og skulu vit tosa um sex? Er tað veruliga neyðugt at tosa um nakað so einfalt sum at "mogga"? Ja, vit skula tosa um sex og tað er alneyðugt. Vit skulu tosa um kyn og kynsliga menning við okkara børn frá barnagarði til tey fara út um skúlagátt. Fyri at tey kunnu blíva betur at verja seg sjálvi móti tí kropsliga ágangi, vit vaksnu fremja ímóti teirra kyni í heiminum, í familjuni, í barnagørðum, í skúlum, í samkomum og kirkjum og aðra staðni vit sleppa fram at. So okkara børn vita, at tey, og bert tey, eiga rættin til sín egna kropp. Vit skulu tosa um sex og seksualitet við tey ungu so tey fáa eina sunna fatan av sínum egna seksualiteti og seksualitetinum hjá hinum. Vit skulu tosa um sex í parlagnum tí pør, ið tosa um sex hava tað betur saman, enn pør, ið ikki gera tað. Vit skulu tosa um sex við okkara vinfólk tí vinfólk, ið tosa um sex, eru glaðari í lívinum enn vinfólk, ið ikki gera tað. Vit skulu tosa um seksuelt fjølbroytni og seksuellan atburð saman við Gudi, tí seksualiteturin er skaptur av Gudi, Vraka og kúga vit seksualitetin vraka og kúga vit Gud. Vit skulu tosa um sex í almenna rúminum soleiðis, at vit fáa eitt natúrligt seksuelt mál og orðaval heldur enn stirvnan og knortlutan orðavavstur. Og mest av øllum skulu vit tosa um sex, tí vit eru seksuellar verur, ið lættliga kunnu koma út at skíta, nøra vit ein seksualitet inni í okkum sjálvum, ið kann blíva heldur óheppin fyri okkum sjálvi og onnur. Men hví tosa vit so ikki um sex? Hví tosa vit ikki miðvíst og skynsamt um nakað, ið hevur alstóran týdning at verða skynsamt og miðvíst tosað um? Hví lata vit vera við at nerta við henda vakra úrmæling, ið er ein av lyklunum til at skilja okkara eksistensgrundarlag sum menniskju? Hvat er tað vit ræðast, sum fær okkum at seta føtur í spennið so fast, at tær nærum brotna?
Er tað kanska tí, at við at skilja lykilin til okkara veran sum menniskju, skilja vit lykilin til frælsið? Og skilja vit lykilin til frælsið, mugu vit taka ábyrgd av egnari atferð í egnum lívið? Og taka vit ábyrgd av egnari atferð í egnum lívið, uppdaga vit, at tað er ikki ein spurningur um, hvat er rætt og hvat er skeivt, men at tað snýr seg um, hvat ið er best fyri ein sjálvan í tann mun, tað ikki skaðar onnur? Og tað ger, at nógv av okkum mugu rannsaka seg sjálvan fyri at finna fram til og fáa loyst upp fyri sínum rangvørgu seksuellu tendensum? Og komin so langt gongur tað eisini upp fyri okkum, at vit avgera sjálvi okkara egnu eydnu, og at sex ikki bara er nakað ein ger, men eins neyðugt fyri at vita um nakað ein er? Og at alt hetta samanlagt gevur pláss fyri einari andaligari dimensjón í javnvág við okkara seksuellu drívmegi og girnd?
Er tað tá ikki nokk so tápuligt av okkum ikki at royna henda úrmælta lykil? - tað kundi jú verið, at hann opnaði upp fyri onkrum.

## Sexologurin hjá planet.fo svarar tínum spurningum

At søkja hjálp hjá einum sexologi ella parrágeva er ikki ókeypis, og kann tað fyri summi verða alt ov kostnaðarmikið til at gerast veruleiki. Men nú kanst tú fáa hjálp heilt ókeypis.

Hevur tú trupulleikar í tínum sexlívi? Ella hevur tú nakrar spurningar viðvíkjandi tínum kærleikslívi, so kanst tú senda tínar spurningar til sexologurin@sosialurin.fo.

Birita Lamhauge Jóansdóttir, sexologor og parráðgevi, svarar spurningum frá lesarunum hjá planet.fo, og verða spurningarnir svaraðir inni á heimasíðuni. Eisini hugleiðir Birita um ymisk viðurskifti innan parlag og kærleika, og verða bloggur hennara at síggja á planet.fo hvørja viku.

Allir spurningar eru í trúnaði, og eingi nøvn ella upplýsingar hjá spyrjaranum verða at síggja á heimasíðuni. Seinni í vikuni verður eisini gjørligt at senda spurningar umvegis planet.fo, soleiðis at eingir upplýsingar nýtast at koma til sjóndar.